UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Dagf.: 22. januar 2021
Málsnr.: 20/02157

Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tryggingarvirksemi
(Tekning av ávísum sertryggingum í útlendskum tryggingarfeløgum)

Javntekstur

Løgtingslóg nr. 55 frá 9. juni 2008 um tryggingarvirksemi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019	**Uppskot**
§ 36. Her í landinum er tað ikki loyvt við vinnuligum endamáli at hjálpa til við, at beinleiðis tryggingar hjá persónum, búsitandi her í Føroyum, føroysk skip ella aðrir vágar, sum eru her í Føroyum, verða teknaðar hjá øðrum enn. 1) føroyskum tryggingarfeløgum, og 2) útlendskum tryggingarfeløgum, sum lúka treytirnar í § 22, stk. 1, ella § 23, stk. 1, umframt útlendskum tryggingarfeløgum, sum hava fingið loyvi frá Tryggingareftirlitinum.	**2.** § 36 verður orðað soleiðis **§ 36.** Her í landinum er tað ikki loyvt við vinnuligum endamáli at hjálpa til við, at beinleiðis tryggingar hjá persónum, búsitandi her í Føroyum, føroysk skip ella aðrir vágar, sum eru her í Føroyum, verða teknaðar hjá øðrum enn 1) føroyskum tryggingarfeløgum, og 2) útlendskum tryggingarfeløgum, sum lúka treytirnar í § 22, stk. 1, ella § 23, stk. 1, umframt útlendskum tryggingarfeløgum, sum hava fingið loyvi frá Tryggingareftirlitinum, og 3) tryggingarfeløgum úr ES/EBS londum, ið tekna váða sambært § 1, stk. 9.”